# Dansur og afterparty við Frændum og Johnny Deluxe



Søren og Noam úr Johnny Deluxe fara at framføra unplugged



Frændur fara at spæla til dans

**Aftan á Planet Awards verður afterparty við Frændum og Johnny Deluxe á Hotel Føroyum. Donsku superstjørnurnar og tað størsta føroyska tónleikanavnið gjøgnum tíðirnar fara at undirhalda**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Planet Awards verður ein stórsligin tónleikaupplivíng úr enda í annan, við bólkunum 200, Marius, Yggdrasil við Kára Sverrisyni, Channe Nussbaum Trio, Terja Rasømussen, Petsi Tvørfoss og Brandi K. Jacobsen. Á tiltakinum verða heiðurslønir handaðar til bestu útgávu, besta føroyska, besta útlendska, bestu songkvinnu, besta sangara og besta nýggja.

Men ert tú ein av teimum, sum ikki hevur eydnast at tryggjað tær eitt atgongumerki til sjálva Planet Awards gallaveitsluna, kanst tú alíkavæl gerast ein partur av tiltakinum.

Tá klokkan er farin av miðnátt fara donsku popprokkstjørnurnar úr Johnny Deluxe á pallin at framføra unplugged. Bólkurin er eitt tað allar størsta danska tónleikanavnið, við løgum sum Drømmer Jeg og Drenge Som Mig, ið longu eru vorðin fólkaogn. Eisini fer Føroya størsta tónleikanavn í gjøgnum tíðirnar Frændur at spæla til dans.

Atgongumerki á kr. 165 fáast í forsølu á Hotel Føroyum og við dyrnar.

---

# Seks egnar planetir

Listamaðurin Sámal Blak og fínmekanikarin David Geyti hava gjørt planetirnar, ið verða handaðar á Planet Awards leygarkvøldið, og hvør planet er vorðin eitt egið listarverk. Planetirnar hava felags snið, men orsakað av dynamiska tilfarinum er eingin planet heilt eins.

### Viðkomandi heiðurslønir

Sámal Blak heldur arbeiðið við at gera planetirnar hevur verið stuttligt. Hann sigur at hetta var lutvíst eitt arbeiði, har hann varð noyddur at hugsa kreativt, men samstundis halda sær fyri eyga, at planetirnar skuldu vera viðkomandi. Hann heldur, at alt ov ofta verður tílík list óviðkomandi og eitt sindur tilvildarlig. Hann setti sær tí fyri, at hetta skuldi ikki vera so við hesum planetunum. Nú planetirnar eru klárar at handa, er listamaðurin væl nøgdur við úrslitið.

### Strammur tíðarkarmur

Sámal sigur, at tíðarkarmurin hevur verið strammur, og tí er tað blivið til langar dagar, men hann fekk beinanvegin fínmekanikaran David Geyti við í arbeiðið, og hetta hevur verið stór hjálp. "David veit hvussu tingini rigga, og hetta hevur hjálpt nógv bæði í kreativu prosessini og í sjálvum handverkinum", sigur Sámal.

### Rustfrítt stál

Planetin er í tveimum partum, eini rustfríari stálskivu og einum fóti, ið er eitt igulker. Stálskivan ímyndar eina fløgu, men eisini eitt Føroya kort og planet búmerkið. Skivan er tekna av Sámali og løgd inn á teldu av David. Tekningin varð síðan send til Danmark, har hon varð útskorðin í rustfríum stáli. Á skivuni er navnið á heiðurslønini gravera.




### Eitt komiskt igulker

Hin parturin er eitt igulker. Sámal greiður frá, at David kom við hugskotinum um igulkerið. Teir vildu hava natúrligt føroyskt tilfar til fótin. Fyrst hugsaðu teir um rekavið, horn ella grót, Hetta tyktist bara so vanligt, sigur Sámal. David skeyt so eitt igulger upp. Í fyrstani helt Sámal ,hetta vera rættiliga komiskt. Men teir fingu ikki slept hugskotinum aftur. Igulkerið er ikki nógv brúkt í listini og líkist nógv eini planet, holini har píkarnir hava verið minna um lond, og litspælið er egið á hvørjari planet. Hetta ger á onkran hátt heiðurslønina egna, serføroyska og vakra.